# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

Tann 7. sept. fingu Lisbeth í Toft og Magni Hovgaard, búsitandi í Malmø, eina dóttur. Hon vigaði 2395 gr og var 47 cm long.

7. oktober fingu Stine Dobak Jensen og Tummas Planck Reinert, Beijing, eina dóttur. Hon vigaði 4040 gr og var 53 cm long.

22. oktober fingu Dina Gram Lydersen og Rúni Mohr, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

23. oktober fingu Anna Maria og Kári Henriksen, Nes, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3350 gr.

26. oktober fingu Beinta og Eyðfinn Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3650 gr.

29. oktober fingu Poula R. og Hanus M. Olsen, Saltnes, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3050 gr.

29. oktober fingu Doris í Garði Joensen, Eiði, og Bárður Brimvík, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4800 gr.

30. oktober fingu Poula og Kári Poulsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

4. november fingu Elsa H. Joensen og Frank Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4350 gr.

# 40 ára hátíðarhald hjá realskúlaflokki



Mynd frá realskúlaframsýningini sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her eru mæmingar frá einum realskúlaflokki í 1956, sum er komin saman til 40 ára hátíðarhald á Hotel Hafnia í 1996.

F.v.: Poul M. Poulsen, Ingibjørg Thomsen, Ingibjørg Jacobsen, Kinn Magnussen, Árni Hansen, Julianna Klett og Eyðbjørg Mikkelsen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 390)

*Myndaeigari: Kinn Magnussen*

## Tøkk



Tøkk øll somul
ung og gomul
fyri blómur og gávur
samtalur og talur
tað á borðið var sett
so øll blivu mett
til tykkum mong
sum vundu flaggið á stong
á mínum 85 ára degi
vil eg takka við gleði

Mest tøkk fái Gud
sum læt falla í lut
eg hendan dag upprann
tøkk fái hann

**Kærastu heilsanir
Justa Poulsen**

## Tøkk



Øllum tykkum, sum so sangglað og uppmuntrandi møttu upp í Løkshøll til útgávukonsertina/sangkvøldið, takki eg hjartaliga.

Eitt ríkt kvøld.

**Vegna okkum øll
Jóannes**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Eilif Lisberg**
Trongisvágur

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Suðuroyar sjúkrahús.
Tøkk til Jónsvein Bæk fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og kransar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum, og tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Svenny, Jonny, Heidi og Bogi**

## Dagurin

6. november. Leonhardus, deyður umleið ár 570. Munkur og trúboðari í Fraklandi. Hann legði ikki í at vera valdur til biskup. Kundi øll lás og allar leinkjur at loysa og gjørdist verndarhalgimenni hjá lásasmiðum og fangum. Navnið er týskt og merkir leyva og harður.

(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Jonn Bjarnaberg, ættaður úr Vestmanna, búsitandi í Esbjerg**, andaðist mikudagin í Esbjerg, 74 ára gamal.

Kistan við **Jens Petur Jensen** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 17 til Hellurnar. Jarðarferðin verður úr Bønhúsinum á Hellunum leygardagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini.